








*Netto: Gasværksvej 16, 1656 København V*
*Super Brugsen: Halmtorvet 25, 1700 København V*
*Føtex: Kalvebod Brygge 59, 1560 København V (Fisketorvet)*

# Føroyum

**Prísir á ávísum gerandisvørum í Keypmannahavn og í Havn**

| | FK | Super-Brugsen | Mikla garður | Føtex | Bónus | Netto |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1/1 óskorið rugbreyð 1 kg. | 27,50 | 11,50 | 25,95 | 11,00 | 25,95 | 11,00 |
| 1/1 groft rugbreyð 500 g. | 28,50 | 18,95 | 30,75 | 13,95 | 30,75 | 15,95 |
| 1/1 vanligt fransbreyð | 18,00 | 17,95 | 16,95 | 16,95 | 16,95 | 9,95 |
| 1 l. av søt-mjólk | 10,50 | 8,75 | 10,75 | 8,50 | 10,35 | 8,50 |
| ¼ l. av pískiróma | 10,25 | 8,95 | 10,60 | 8,95 | 10,20 | 7,95 |
| 2 kg. av eplum | 24,95 | 19,95 | 21,95 | 13,00 | 16,90 | 17,00 |
| 1 kg. av sukuri | 7,95 | 10,95 | 7,95 | 9,50 | 6,90 | |
| 1 pk. av farin | 13,95 | 10,95 | 13,95 | 10,95 | 12,90 | 9,50 |
| 1 Buko smyrjiostur v. rækjum | 19,95 | 19,50 | 19,95 | 19,50 | 18,90 | 18,50 |
| 8 fruktir | 20,00 | 24,00 | 24,00 | 22,00 | 20,00 | 16,00 |
| Malið oksakjøt pr. kg. uml. 10 % feitt | 57,50 | 54,95 | 55,90 | 39,95 | 55,90 | 49,95 |
| 275 g. Taffel chips | 29,95 | 20,95 | 24,95 | 20,95 | 26,90 | 16,00 |
| 20 Prince | 43,00 | 33,00 | 42,95 | 32,00 | 42,90 | 32,00 |
| 250 g. Kærgaarden | 13,95 | 13,95 | 17,95 | 13,95 | 14,90 | 13,95 |
| 1 kg. av leyki | 11,95 | 7,95 | 13,95 | 6,00 | 12,90 | 9,00 |
| 250 g. Sunnmaid rosinur | | 9,95 | 11,95 | 10,95 | 9,90 | 9,95 |
| Ota Solgryn 950 g. | 19,95 | 18,95 | 23,95 | 17,95 | 18,90 | 17,95 |
| | **357,85** | **311,15** | **374,40** | **276,05** | **352,10** | **263,15** |

*Prísirnir eru frá 15. desember 2006*







| Vøra | Meðal Fo | Meðal Dk | Munur í % |
|---|---|---|---|
| 1/1 óskorið rugbreyð 1 kg. | 26,47 | 11,17 | 137% |
| 1/1 groft rugbreyð 500 g. | 30,00 | 16,28 | 84% |
| 1 kg. av leyki | 12,93 | 7,65 | 69% |
| 275 g. Taffel chips | 27,27 | 19,30 | 41% |
| 20 Prince | 42,95 | 32,33 | 33% |
| 1 pk. av farin | 13,60 | 10,47 | 30% |
| 2 kg. av eplum | 21,27 | 16,65 | 28% |
| 1 l. av søt-mjólk | 10,53 | 8,58 | 23% |
| ¼ l. av pískiróma | 10,35 | 8,62 | 20% |
| Malið oksakjøt pr. kg. uml. 10 % feitt | 56,43 | 48,28 | 17% |
| 1/1 vanligt fransbreyð | 17,30 | 14,95 | 16% |
| Ota Solgryn 950 g. | 20,93 | 18,28 | 14% |
| 250 g. Kærgaarden | 15,60 | 13,95 | 12% |
| 250 g. Sunnmaid rosinur | 10,93 | 10,28 | 6% |
| 8 fruktir | 21,33 | 20,67 | 3% |
| 1 Buko smyrjiostur v. rækjum | 19,60 | 19,17 | 2% |
| 1 kg. av sukuri | 7,60 | 10,23 | -26% |

| | |
|---|---|
| 01 MATUR OG DREKKA | 115,4 |
| 01.1 Matur | 116,3 |
| 01.1.1 breyð og kornvørur | 127,6 |
| 01.1.2 kjøt | 117,7 |
| 01.1.3 fiskur | 112,7 |
| 01.1.4 mjólk, ostur og egg | 115,7 |
| 01.1.5 oljur og fitievni | 121,6 |
| 01.1.6 frukt | 99,6 |
| 01.1.7 grønmeti | 121,1 |
| 01.1.8 sukur, sjokoláta, góðgæti o.l. | 110,3 |
| 01.1.9 aðrar matvørur | 105,7 |
| 01.2 Drekka | 108,1 |
| 01.2.1 kaffi, te og kakao | 93,1 |
| 01.2.2 sodavatn, saft og vatn | 114,5 |
| 02.2 Tubbak | 140,3 |
| 04 BÝLI | 121,7 |
| 04.1 Húsaleiga | 189,4 |
| 04.2 Sethús, rentuútreiðslur | 98,1 |
| 04.3 Viðlíkahald av bústaði | 114,4 |
| 04.5 Ravmagn og hiti | 132,1 |
| 04.5.1 ravmagn | 100,3 |
| 04.5.3 brenniolja | 161,6 |
| 04.5.5 fjarhiti | 128,3 |
| 08.1 Postur | 186,5 |
| 8.2 Teleútgerð | 48,3 |
| 8.3 Teletænastur | 83,8 |
| 12.4 Barnaansing | 129,5 |
| 12.5 Tryggingar | 119,3 |
| 12.5.2 húsatryggingar | 116,8 |
| 12.5.4 bilatryggingar | 122,2 |
| 12.6 Fíggjartænastur | 132,9 |

*Yvirlit yvir prístalið á ávísum vørubólkum fjórða ársfjórðing 2007. Index 100 er ásett í ár 2000. Frá 2006 til 2007 vaks miðalbrúkaraprístalið 3,6 prosent. Hetta er væl størri ársmeðal prísvøkstur enn frá 2005 til 2006, tá vøksturin var 1,5 prosent. Munurin stavar serliga frá hækkandi matvøruprísum og vaksandi býlisútreiðslum seinastu ársfjórðingarnar, sigur Hagstovan*

røkka til, so er støðan uttan iva hvaðna verri her á landi. Í Danmark eru nevniliga veruligir lágpríshandlar, umframt allir teir smáu innvandrarahandlarnir, sum selja sera bíligar vørur.

## Lækkið mvg'ið á mjólk og breyð

Í sambandi við stóra prísvøksturin í Føroyum, mælir samskipanin hjá verka- og fiskimonnum, Samtak, til at lækka mvg'ið á mjólk, breyð, mjøl, frukt, grønmeti og øðrum neyðugum húsarhaldsvørum fyri at lætta um í føroysku húsarhaldunum.

- Henda lækkingin hevði verið tann besti skattalættin, og hetta stig rakar eisini sosialt rætt. Hevði mvg'ið lækkað til 10 prosent av neyðugum húsarhaldsvørum, so skuldi forbrúkarin einans rinda 10 kr. omaná hvørjar 100 kr. í mun til 25 kr., sum tað er í dag, sigur Samtak.

Víðari sigur Samtak, at hóast arbeiðarafeløgini gjørdu sáttmálar, sum góðu løntakarunum ein fittan lønarvøkstur í farna ári, so er prísvøksturin á grundleggjandi vørum og tænastum hækkaður somikið nógv, at lønarvøksturin verður etin upp av hesum.

- Tað ber ikki til, at gera nakað við altjóða prísirnir á eitt nú korni og olju, men landið hevur kortini møguleika umvegis mvg skipanina at ávirka prísirnar á gerandisvørum, sigur Samtak. Og víst verður á, at seinastu árini er ein alsamt størri partur av skattainntøkunum í landinum komin inn í avgjøldum, sum ikki eru lutfalshækkandi. Hetta vil siga, at fólk í láglønarbólkunum rinda lutfalsliga nógv í mun til inntøkuna.

- Verður mvg'ið á alneyðugum nýtsluvørum lækkað, ger tað tískil stóran mun serliga hjá teimum við meðal og lágum inntøkum, sum hava fleiri børn av forsyrgja, sigur Samtak.